# Valdar rættarloysi í landsstýrinum?

**Eftir at sannleikin kemur fram um Strandferðsluflytingina, spyrji eg meg sjálvan, um vit við „breiðu samgonguni“ í veruleikanum hava fingið einaræði í Føroyum. Har allar reglur, avtalur og mannagongdir verða settar til viks, og menniskjur ongan týdning hava. Alt ber til, tí „hatta orðna ogur bara“**

HØGNI HOYDAL



So vóru øll aftur tikin á bóli. Fyrst kemur ein útmelding frá landsstýrinum um, at avgerð er tikin um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar. Ein ætlan, sum Tjóðveldisflokkurin fleiri ferðir hevur skotið upp á tingi, og sum vit stuðla - eisini vit, ið eru vald í Suðurstreymi. Vit hava fleiri ferðir spurt og fingið at vita frá landsstýrismanninum, at ein arbeiðsbólkur hevur sitið og arbeitt við framtíðar bygnaðinum hjá Strandferðsluni – við luttøku frá fólki á stovninum sjálvum.

Og nú mundi so vera komið á mál.

Allar avtalur og reglur settar til viks

Men gakk! Eftir at tíðindini eru komin út, ganga nakrir tímar. So er greitt, at her er ongin fyrireiking gjørd. Starvsfólkini eru hvørki kunnað ella hava verið við at leggja til rættis. Ja, eru ikki so frægt sum hoyrd. Og hóast tað eru landsstýrisins egnu reglur og undirskrivaðir sáttmálar, ið verða brotin, so verja løgmaður og landsstýrismenn seg við, at “tað hevur ongan týdning” og hetta er bara ein lítil “svipsari”.

### Ikki einstakur svipsari

Eg átti at havt grunað, at hetta var veruleikin. Men hevði hóast alt vónina um, at Jacob Vestergaard sum nýggjur landsstýrismaður, ikki var dottin í somu gravir, sum hetta landsstýrið støðugt hevur sitið so djúpt í.

Framferðin í hesum máli minnir óhugnaliga nógv um pedagog-málið á Tvøroyri. Flytingina av Miðnámsskúlanum í Vági. Uppsagnirnar á Matrikulstovuni. Uppsagnirnar í miðfyrisitingini í 2004. Undirskrivingarnar av sáttmálum við Danmark, sum seta alt til viks, sum vunnið er – “overnight”. Undirskrivingina av avtalu um Flogvøllin, har vit geva burtur 800 mió. afturfyri at taka ábyrgd av 30 ára forsømilsi. Alt lunnar á einum drátti, har alt rennur á sjógv og onki verður drigið upp: Ongin samráðing. Ongin fyrireiking. Ongin viðgerð. Onki atlit til rættindi og skyldur og fólkaræðisligar siðvenjur. Ella til, hvussu vit fáa eina væl virkandi almenna fyrisiting.

### Kollegiala landsstýrið sett í verk aftur

Vit eru fleiri, ið veruliga hava hildið, at rættartrygdin í Føroyum og fyrisitingarliga ábyrgdin var fyri bata eftir nýggju stýrisskipanarlógina, har løgmaður og landsstýrisfólk fingu rættarliga og politiska ábyrgd. Og nógvar avleiðingar hava verið tiknar í árunum frá 1995 og frameftir av skeivari fyrisiting.

Hetta í mun til ruðulleikan áður, har landsstýrið tók „kollegialar“ avgerðir og hevði kollektiva ábyrgd - og tingfólk rótaðu inni í fyrisitingini og viðgjørdu mál.

Men vit hava eisini her spolað langt aftur í fortíðina. Onki fær avleiðingar. Ongin ábyrgdast fyri nakað. Alt verður avtalað handan stongdar dyr millum landsstýrisfólk og tilvildarlig umboð úr samgonguni í útvaldum rossahandlum. Og síðani kunngjørt fólkinum.

Og - uttan nakran spurning frá fjølmiðlafólki - verður dagliga kunngjørt, at „landsstýrið er samt“ um ymsar avgerðir, ella at nú skulu stórar avgerðir leggjast fyri landsstýrisfund. Altso: Landsstýrið er aftur vorðið kollegialt - og ábyrgdin og avleiðingarnar sum áliggja hvørjum landsstýrisfólki sær av sínum málsøki, er burturfjarað.

### Onki skilmark millum partapolitikk og fyrisiting

Afturat hesum eru aðalstjórnarnir settir at orða politikk og visjónir fyri eina samgongu og ein løgmann, sum ongan politikk og onga visjón hava. Aðalstjórarnir sita sum formenn í embætisbólkum, sum framleiða tilfar og hugskot, ið bert skal nýtast í einum valstríði og sendast í hvørt hús til ábót og vónar fyri tað, ið landsstýrisflokkarnar ikki hava framt í valskeiðnum. Og hvussu skulu nú aðalstjórarnir tryggja fakligt mótspæl og vísa á rætta framferð, tá tað eftir ætlan verða teirra egnu uppskot og hugskot, ið politiskir flokkar fara til val uppá? Hvør kann nú skyna á partapolitikki og fyrisiting?

Neyðugt er, at bæði fjølmiðlar og fólk, ið vara av politiskum flokkum ella av fyrisitingini tora at krevja eitt minstamark av rættartrygd og rættarverju frá sitandi stýri. Í løtuni valdar rættarloysi. Samgongan er so breið, at ávís samgongufólk sleppa at spæla fríspæl og spæla at vera í andstøðu til tær avgerðir, tey sjálv eru stuðulin hjá. Og tað er sum oftast besta trygdin fyri, at onki hendir.

Tað ringasta er, at skilagóðar ætlanir á henda hátt ístaðin bert elva til, at undirtøkan millum fólk svinnur burtur, og kílar verða settir inn millum samfelagsbólkar.

*framhald av síðu 10*

tó, honum líkt, hildið við sítt, og aftur og aftur víst á tað gagnliga og skilagóða við at flyta umsitingina til Suðuroyar.Og nú loksins fær hann sín vilja. Umsitingin av strandferðsluni verður flutt til Suðuroyar.

Men eg kenni meg beinleiðis snýtta, tá eg fái at vita, hvussu hetta landsstýrið skaltar og valtar við fólki.

Ein skuldi trúð, at tað vóru starvsfólkini, ið sjálvi høvdu arbeitt við málinum, og at alt varð blivið viðgjørt í umsitingini eftir reglunum.

Men starvsfólkini vistu onki!

Tað sigur løgmaður seg harmast um, men tað einasta hann fer at gera er at ”kanna lekan”. Tvs at trupulleikin er ikki handfaringin hjá landsstýrismanninum. Ella greiða brotið á starvsfólkapolitikkin. Ella brotið á ásetingarnar í sáttmálanum. Nei, trupulleikin sambært løgmanni í degi og viku hóskvøldið var, at onkur ”hevði likið”. Altso, trupulleikin er nú, at onkur hevði avdúkað manglandi virðingina fyri starvsfólkapolitikkinum hjá landsstýrinum.

Men tað er ikki bara løgmaður, sum sigur, at onki skal fáa avleiðingar. Samgongufólk koma nú kropp á kroppi og „harmast um mannagongdina“. Men tey krevja onga ábyrgd av teimum landsstyrismonnum, tey hava valt. Fyrst løgmaður. Og síðani landsstýrismaðurin í fíggarmálum, sum hevur starvsfólkapolitikkin sum málsøki og allar sáttmálar hjá tí almenna. Hann sigur, at starvsfólkini hava ikki „rætt at verða hoyrd.“

Toppurin var tó útsøgnin frá landsstýrismanninum sjálvum, sum á Portalinum samanber hesa avgerð við, at Matrikkulstovan flutti úr Jónas Brocksgøtu út á Argir. Hetta er beinleiðis at sláa alt upp í glens, og ein háttur at gera gjøldur burturúr fólki, sum ikki fáa vart seg.

Ynskiligt var, at løgmaður traðkaði til í hesum máli, men kenni eg hann rætt, so ger hann heldur onki í hesum máli. Jú hann fer at ”kanna lekan” so tað sær út, sum um, at hann ger okkurt. Men hann tekur ikki hond um trupulleikan.

Tað ræður jú um at lata fólkaflokkin gera sum honum lystir, og at halda sambandsflokkinum inni í hitanum. So mugu avtalur, reglur og mannalagnur rekast sum tongul í brimi.

Í hesi samgongu vil mann heldur missa trúvirði enn vald.

# Eingin kann hugsa longri enn hann hevur mál til

REGIN EIKHOLM

Tí er neyðugt at verja og menna móðurmálsligt orðatilfeingi móti puristiskum piratvirksemi.

### Húskallur hjá íslendskum

Tað kemur í tøkum tíma, at Kringvarp Føroya tordi at slíta puristisku málleinkjurnar á sjálvum 50 ára degnum 6. februar, við at bjóða inn til opna máldebat um móðurmálið í fimmaranum uttan forhondssensurering - tillukku við tí. Tað eru mong, sum eru sera glað fyri hesa kærkomnu broyting, men at hetta loypti hvøkk á onkran puristin kann valla undar nakran, tí teir hava jú hesi seinastu mongu árini havt fríar hendur í Útvarpinum til at sensurera og lúka móðurmálið uttan nakra lógarheimild. Tað er ein gáta fyri mong, hví hesir íslendsku sambandsmennirnir óátalaðir sleppa at gera føroyingar til málsligir húskallar hjá íslendska málinum. Nýføroyskt skal gerast komplimentert til danskt, tí alt sum ber brá av donskum ella germanskum hjáeksistensi verður lúkað burtur. Eftir stendur meinigi føroyingurin við einum fremmandagjørdum hálv ella heil íslandskum, substituerað við naknum nýyrðum.

### Málslig heilavasking

Tíverri hevur tað higartil eydnast puristunum at sáa so mikið av málsligum misstresti niður í føroyingin, at eitt ótal av føroyingum longu nú ganga runt og gremja seg um, at teir dugu ikki føroyskt ella rættari móðurmálið. Eitt nærmast skizofrent fyribrigdi ið vit annars bert kenna frá totaliterum stýrum við heilavasking sum speciali.

Móðurmálslig niðurgering er sera óheppin, tí móðurmálið er grundstøði undir allari málsligari menning og mentan eins og okkara intellektuellu tilvitan. Kendi eysturrikski filosoffurin Ludvig Wittgenstein (1889-1951) sigur tað sera greitt: “Eingin kann hugsa longri enn hann hevur mál til”, men vit hava longu fingið tað fyrstu ávaringina frá Pisakanningini.

Annars áttu vit at lært av Rikard Long (1889-1977), mál- og bókmenta-granskari, yrkjari og politikari. Hann vará ungum árum heitur talsmaður fyri málreinsan, men kom seinni til ta sannføring, at málreinsan, ið lúkar fremmand orð úr málinum, vil køva tað natúrliga talumálið, og tí vendi hann málreinsanarkósini bakið og gjørdist aktivur mótstøðumaður móti málreinsan.

### Málslig lóggilding.

Sambært Løgtingsins Umboðsmanni, er eingin lóg galdandi fyri føroyska málið ella stavsetingina, og tí finst eingin lóggildaður stovnur ell persónur ið kann siga hvat er rætt ella skeivt. Málnevndin arbeiðir eftir kunngerð nr. 14 frá 7. jan. 1985, ið fevnir um vegleiðing og at hava eyguni eftir málspillum, men málnevndin hevur ikki lóggildaðan rætt til at avgera hvat er rætt og hvat er skeivt.

Eingin føroysk orðabók er enn autoriserað ella lóggildað. Tískil kann ongin taka sær rætt til generelt at siga, hvat er rætt føroyskt ella ikki, og so als ikki út frá devisini um at danskt og føroyskt ikki kunnu hava samanfallandi orð. Puristarnir umboða í hesum høpi einki minnið enn málsligt piratvirksemi.

### Málið sum politiskt amboð

Málið er í sjálvum sær eitt ópolitiskt amboð eins og ein klípitong ella ein violin, men í Føroyum verður málið politiserað. Innan fleiri almenn økir verður málið eisini politiskt missbrúkt av ósmædnum puristum, sum uttan lógarheimild loyva sær at knæseta eitt nýføroyskt mál, ið fremmandager vanliga føroyingin fyri móðurmálinum. Hetta sæst serliga grovt innan ávísa fakterminologi, ið krevur ein neyvleika, sum puristisku dilettantarnir ikki hava førleika til. Tíverri hava vit longu fingið lærubøkur á nýføroyskum, sum eru ein landaskomm heldur enn eitt prýði.

Úrslitið er ein babylonskur málforvirringur, ið ger at mangur føroyingur í dag situr og lærir seg “føroyskt” gjøgnum donsk føroysku orðabókina. Fáur torir at mótmæla, tí hann sum muddar ímóti verður skýrdur sum svíkjari.

### Málstevnunevndin

Nýggja Mástevnunevndin er sett fyri at gera uppskot til almennan málpolitikk, og vónandi fer hon at skjóta upp at legalisera móðurmálið við tess integreraðu altjóða orðum, ið eitt nú mynda sjálvt kjølfestið í flestu lærugreinum. Ein ávís rationalisering verður neyðug bæði í alfabetinum, við stavseting og í málinum sjálvum, so málið hóskar til nútíðina og megnar at endurspegla hugaheimin hjá føroyska móðurmálslinginum, uttan at hann fyrst skal kunna seg um nýføroyskt gjøgnum donsk føroysku orðabókina.

Puristisk nýyrðir eiga ikki sum nú at trokast inn í málið, men eiga at vera tøk um tørvur er fyri teimum. Eitt breitt forum av málsliga áhugaðum lærdum sum leikfólki kundi hóskani viðgjørt aktuel nýyrðir og harvið tryggja eitt ávíst støði eftir nærri fastsettum reglum, við neyvum atliti til verandi móðurmál.

### Fremmandaorð og mentunarberi

Eitt uttaní frákomandi fremmandaorð kom í gomlum døgum inn í málið sum ein nýskapandi mentunarberi, kanska eftir frammanundan at hava ferðast gjøgnum fleiri alheims mál og har tillagað og fingið íblástur av ártúsundar sivilisatión. Hesi orð ríkaðu málið og gjørdust sum fráleið ein partur av okkum sjálvum, okkara mentan og samleika. Hetta sá Rikard Long, sáli, men ikki okkara blindu puristar, tó tað sum verri er, í blinda liðnum verður tann einoygdi kongur!